## DAGSINS MEINING

# Syrgilig søga - fyri mann og skipan

Sosialurin hevði eina áhugaverda frásøgn í gjár um ein fiskimann, sum var komin til skaða umborð á trolara. Frásøgnin avdúkar til fulnar, hvussu stirvið og byrokratisk føroyska (føroyskt-danska) fyrisitingin er. Ikki minst tá tað snýr seg um almanna- og heilsuviðurskifti.

Fiskimaðurin fekk ein álvarsaman løst á einum langfaratrolara eystanfyri. Hann breyt stórutá og skaddi tummilinfingur. Men hann boðaði ikki frá skaðanum beianvegin, tí hann vildi ikki, at trolarin skuldi bróta túrin av og fara inn við honum. Hann beit so á kampi og stríddist við pínu og trega, til hann 14 dagar seinri kom undir læknahond.

Síðani fer »maskinaríið« ígongd. Eftir fleiri skurðviðgerðir eru hvørki fótur, øksl ella hond í lagi, og so kemur spurningurin um, hvat stig av avlamni talan er um. Hvørt í sínum lagi er ein stóratá ella ein tummil tveir smáir likamslutir, men teir eru ógvuliga týdningarmiklir, bæði tá tað snýr seg um at arbeiða og ganga.

Færøernes Ulykkesforsikringsråd sigur, at avlamni er 10 prosent, men kært verður til Den Sociale Ankestyrelse, sum setir avlamni upp í 20 prosent, og tann avlamni fær 70.000 krónur afturat í endurghaldi. Men, sum Leivur Egholm, sigur, eingin tekur atlit til, at hann fær ikki arbeitt og hann fær ikki viðbót fyri mista inntøku.

Hetta er ikki annað enn mannminkandi og aftur eitt prógv um, at okkara skipan, tá tað kemur til slík viðurskifti, riggar út av lagi illa. Vit skulu hava í huga, at fyrst verður maðurin skaddur, so fær hann fyrst pengar frá Lønjavnongargrunninum í 3 mánaðir, frá einum sjúkragrunni hjá FF í 4 mánaðir, síðani pening frá Vanlukkutryggingini í eitt tíðarskeið og at enda dagpengar frá Almannastovuni í 3 ár.

Men henda pensjón er jú ikki at liva fyri hjá familjumanni, so fiskimaðurin varð noyddur at selja húsini við stórum tapi. Eyðmýkjandi og syndarligt. Aftur eitt prógv um, at skipan okkara á hesum øki er ómenniskjalig, stirvin og virkar illa. Ein avdúkandi frásøgn, sum vónandi fær onkran politikkara at vakna.

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

**Malan Johansen oljusamskipari**

Samskipari er nú settur at røkja oljuáhugamálini hjá føroysku vinnuni

Uppgávurnar í sambandi við komandi oljuvinnuna eru nú so umfatandi, at Arbeiðsgevarafelagið avgjørdi at søkja eftir einum samskipara at taka sær av hesum øki, skrivar Vinnuhúsið.

12 umsóknir vóru til starvið, og Føroya Arbeiðsgevarafelag valdi at seta Maluna Johansen í starv. Malan er 34 ár, og er útbúgvin Cand. merc. Hon hevur starvast trý ár í Landsbankanum, var síðani skrivari hjá nevndini sum gjørdi kommunuálitið og eftir hetta var hon 1/2 ár hjá oljufelagnum Lasmo. Hon tók síðani eina ískoytisútbúgving sum journalistur



og hevur síðani juni '99 verið tíðindakvinna hjá Sjónvarpinum.

Malan tekur við starvinum 1. mars, skrivar Vinnuhúsið.

# Minningarorð um Ejvin Egholm, Ragnar Ørvarodd, Sverra Egholm og Niels Edvin Ørvarodd

Ja ein má siga, at vit vita lítið, tá vit fara upp á morgni og byrja okkara dagligdag, hvat dagurin hevur at bjóða okkum.

Onkur av okkum tekur hvørja løtu í lívinum sum eina sjálvfylgju, meðan onkur annar dugur betur at seta prís uppá virði at liva. Eitt er sikkurt, vit eru ikki komin her fyri at blíva verandi, men vit bíða eftir einum betri.

Men at missa ein, vit eru góð við og kenna í familjuni, tað er ikki altíð so lætt at góðtaka. Tá eg fyrst í juni mánaði fekk boðini um, at nú var Ejvin mammubeiggi deyður, eftir at heilsan nívdi hesi seinastu árini – túrurin var komin til Ejvin mammubeiggja at leggja árarnar inn.

Eg hugsaði við mær sjálvum, ja Guð veit, hvør verður tann næsti. Ragnar, ein av mínum eldru beiggjum varð um tað mundið á Landssjúkrahúsinum, har hann hevði eina langa og svára sjúkralegu, hann hevði eitt gott tol, og oftani kundi hann siga: »tað blívur betur«, tað var, sum um hann skuldi ugga okkum, sum vóru hjá honum, men hann visti, hvønn veg tað bar og var ikki bangin fyri at fara haðani frá, og seinnu helvt av juni mánaði var so lívstráðurin slitin hjá Ragnari bróðuri. Saknurin hevur verið stórur, hann plagdi, tá hann orkaði og var í Havn, at koma inn á gólvið við onkrum góðum til jóla, men seinastu jól var hann so ikki. Mikudagurin 24. januar, eftir at eg havi verið í svimjihøllini, fór eg saman við Annu og Sverra mammubeiggja/gubba heim til tey at vitja, og vera saman við teimum eina løtu. Anna, sum altíð er blíð og ger kaffi, vit sótu so hugnaligt, og Sverrigubbin sum væl dámar at práta um slekt og skemtast, alt var so gott. Eg fór heim glað um, at eg hevði vitjað familjuna. Mikukvøldið var Sverrigubbin deyður, og ikki vardi tað meg, at tað skuldi vera seinasta vitjanin saman við honum.

Hetta er alt so ófatiligt, haldi eg. Tað skuldi ikki enda enn. Niels Edvin pápabeiggi var eisini komin til Havnar á Landssjúkrahúsið vegna sína vánaligu heilsu, og leygardagin í somu viku doyði pápabeiggin so eisini. Alt hetta er hent so ómetaliga knappiliga og er sera ringt at skilja, men at teir eru nógv saknaðir sást á skaranum í Havn og á Sandi.

Eg vil lýsa frið yvir minnið um Ejvin mammubeiggja, Ragnar bróður, Sverra mammubeiggja og Niels Edvin pápabeiggja.

Og til tykkum, sum eftir sita, Guð styrki tykkum og heldur sína einglavakt rundan um tykkum.

**Snæbjørg**



*Bergur Hanusson, djóralækni*



*Heri Joensen, prestur*



*Heri Kragesteen, sálarfrøðingur*



*Ingi Højgaard, løgfrøðingur*



*Jens Andreassen, lækni*



*Jóhanna á Tjaldrafløtti, føðslu/húsarhaldsfrøðingur*



*Jón Klein Olsen, politistur*



*Jón Kragesteen. Ferðslutrygd*

# Spyrjið serfrøðingarnar

Adressan:
Sosialurin,
box 76,
110 Tórshavn,

Fax 314720
ella teldupost:
spyr@sosialurin.fo

– og merkið, hvørjum tit seta spurningum.

**Svarini verða prentað í blaðnum mikudag**



*Julianna Næs, pedagogur*



*Sjúrður Johannesen, sosialráðgevi*



*Turid Thomsen, lestrarvegleiðari*



*Marius Staksberg, málfrøðingur*


**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 348mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




# Her umborð brúka vit blóðtrýst

**Enn er ongin egningarmaskina komin umborð á Jøkul, men tað verður kanska einaferð, stríð er av at knossa stampar. »Umborð á hinum bátunum brúka teir oljutrýst, hjá okkum brúka vit enn blóðtrýst«, sigur Johan Johannesen, skipari á útróðrarbátinum Jøkuli Klaksvík**



*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

**Klaksvík, Sosialurin:** Mánakvøldið lógu nógvir útróðrarbátar á Stongunum. Streymurin var ikki heilt til vildar og eitt sindur av vindi var eisini, so bátarnir, teir flestu lógu við bryggju. Her liggja so at siga bara línubátar. Longur inni liggja snellubátarnir og teir eru ikki rættuliga komnir í gongd enn við várróðrinum. Teir loysa neyvan av álvara fyrr enn um einar fjúrtan dagar.

Útróðrarbáturin Jøkul, ein prúdligur 50 tonsari liggur klárur upp á spring og tekur stampar umborð. Teir seta ikki langa línu hendan túrin. 40 stampar. Men veður berætningurin er heldur ikki og góður og betri er at binda um heilan fingur.

– Seinast vit vóru úti viðraði so illa, at vit máttu ganga frá línuni, vit slitu. Eini 15 stampar standa norðanfyri. Tá vit eru lidnir at draga, so fara vit at royna at dreggja eftir teimum, sigur Jóhan Johannsen, skipari á Jøkli.

Meðan stamparnir koma upp á pláss afturi í skúrinum gongur prátið.

»Nei, egningarmaskina, hana hava vit ikki fingið enn. Meðan aðrir nýta oljutrýst, so brúka vit blóðtrýst. Men tað verður kanska ikki so altíð«, sigur Jóhan Johannesen.

Annars er skipið gott. Jøkul er bygdur í Klaksvík, norðuri á Grótrætt og hetta er tann størsti báturin, sum varð bygdur har. Hann er 50 tons, sjálvt um lastin er lítil. Hetta kemst eisini av at lastin er frystilast og tá fer bjalvingin við so nógvum. Jøkul hevur eisini roynt eftir laksi og hann hevur stóran vatnbeholdning, sum eisini tekur av lastini.

### Havsbrún einmallur úti

Meðan Jøkul loysir og hvørvur út í myrkrið, í tí kavakløddu Klaksvíkini á veg norður um Klakk, norður gjøgnum Djúpini og norður í hav, hómast ein reyð bakborðslantera koma inn eftir. Egningarmenn hjá Jøkli kenna beinanvegin. »Hatta er Olgar og Havsbrún, hann lumpaði allar hinar og fór einsamallur úr í gjárkvøldið og eg havi hoyrt, at hann hevur fingið ein góðan dag, yvir 8000 pund,« Olgar er so nógv tann snildasti her hjá okkum sigur ein maður í dýnujakka eitt sindur errin á kaiini.

Havsbrún leggur at og Olgar stendur prúður og troyttur í stýrhúsvindeyganum. Hann hevur onki annað gjørt sítt vaksna lív enn at róð út og hann er ein úrmæligur á økinum, fleiri bátar hevur hann havt, síðan hann bryjaði við opna bátinum Víkingi í sjeytiárunum.

Løtu seinni gongur prátið á dekkinum, meðan engdir stampar koma umborð og hinir óengdu fara í land aftur.

Teir egna goggu, men ikki burturav. Teir egna eisini høggusløkk. Og so knossa teir stampar aftur og fram. Men Olgar hevur ongar ætlanir um at fáa sær engingarmaskinu enn.

– Teir eru so raskir hjá okkum at egna, at tað stendur ikki á. Serliga teir ungu eru raskir, sigur hann og peikar á ein ungling, sum stendur á bryggjukantinum, haldandi einum sera fittum hundi í bandi.

– Teir vinna sær lummapengar og hasin klárar saktans einar 15 stampar ein góðan dag, sigur Olgar.

– Tað var ein øgiligur vindur eina løtu í dag, meðan vit sigldu inn aftur, men nú eru líkindini betri, sigur Olgar og ger seg til at fara afstað aftur. Steðgurin var stuttur hesuferð.

– Vit mistu tríggjar dagar í seinastu viku, tí vit høvdu maskinskaða, so tað er bara at fara av stað aftur, sigur hann.

Tríggir snellubátar vóru eisini úti í Klaksvík mánadagin. Men teir royndu stutt og nærhendis. Tað var ikki farið at skýma, tá teir vóru aftur.

Føroyingar í India:

# Sluppu undan jarðskjálvta

**Niels Pauli Danielsen og fimm aðrir føroyingar vóru staddir í India, tá vanlukkuligur jarðskjálvti rakti landið. Teir komu tó heim í øllum góðum um vikuskiftið**

JARÐSKJÁLVTI
*Eyðun Klakstein*

Fleiri føroyingar vóru staddir í India, tá ógvusligur jarðskjálvti rakti landið fyri góðari viku síðani.

Myndugleikarnir hava hildið upp á, at eini 100.000 fólk lótu lív í jarðskjálvtanum, sum rakti norðara part av landinum, men veruliga talið er helst um 35.000.

Í hinum endanum av landinum vóru føroyingar á ferð júst um hetta mundið. Ein teirra var sóknarpresturin í Klaksvík, Niels Pauli Danielsen.



*Niels Pauli Danielsen og aðrir føroyingar vóru staddir í India, tá ógvusligi jarðskjálvtin rakti landið*

– Vit merktu einki til sjálvan skjálvtan, tí India er eitt sera stórt land, og skjálvtin var har norðuri í landinum, greiðir Niels Pauli frá.

### Stúrin starvsfólk

Trý føroysk pør vóru í donskum ferðalagi í India, og tey hildu til í ferðamannaøki har suðuri í landinum. Har í økinum er nógv av fólkinum kristin.

– Onkur av starvsfólkunum á hotellinum høvdu skyldfólk í nánd av jarðskjálvtanum, og tey vóru eitt sindur stúrin eftir hendingarnar, sigur Niels Pauli.

Men annars upplivdu føroyingarnir bara jarðskjálvtan gjøgnum fjølmiðlarnar – bæði indiskar og útlendskar.

Leygardagin fór ferðalagið á flog úr India, og allir føroyingarnir eru komnir heimaftur í øllum góðum.

# Ostaborðhald í klubbanum

Fríggjakvøldið 23. februar fer Klaksvíkar klubbi at hava stórt ostaborðhald.

Umframt stórt úrval av ostum verður ymiskt tilhoyr og nógvir leskidrykkir at fáa afturvið. Jákup Ziskason skal standa fyri matinum.

Eftir borðhaldið verður harmonikkudansur við Eiler, Erland og Hera.

Borðhaldið er serliga ætlað tilkomnum, og tilmeldingarlisti liggur frammi í klubbanum.